

# 8 spurningar um jól

## Jóannes Eidesgaard, løgmaður

***Hvat er tað besta við jólum?***
Tað er friðurin, sum fellur yvir okkum, og at vit taka okkum tíð at koma hvørjum øðrum við.

***Hvat er tað keðiligasta við jólum?***
Eg haldi avgjørt einki keðiligt vera við jólum, tí eg havi síðani eg var barn altíð elskað jólini.

**Hvussu helt tú jól sum barn?**
Sum børn flest trygt í mínum barndómsheimi. Jólini tá vóru tað øðrvísi enn í dag, at tá fekk man mat, sum man vanliga ikki fekk aðrar tíðir, og tú fekst gávur, og tað var fantastiskt, tí peningaríkiligheitin var ikki tá sum nú. Jólini tá sum nú vóru ein familjuhátíð. Hátíðin er tann sama í dag, men persónarnir eru aðrir, men framvegis familjan.

***Hvussu heldur tú jól í ár?***
Sum vanligt heima hjá mær sjálvum ella hjá øðrum av børnunum. Og vónandi fái eg eisini í ár tikið mær stundir jólaaftan at vitja Herbergið hjá Frelsunnarherinum og jólahaldið í KFUK.

***Hvat heldur tú um jólaresið í desember?***
Tað er synd í fólki, sum verða tikin við av resinum. Eg eri púra óávirkaður, men haldi sjálvsagt fram við mínum privata arbeiðsresi.

***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***
Ja einaferð í Keypmannahavn. Tað var eisini hugnaligt, tí familjan var har eisini, og tað er hon, sum er avgerandi fyri hugnan. Staðið hevur minni týdning.

***Keypir tú sjálv/ur tínar jólagávur?***
Eg keypi eina jólagávu beint áðrenn afturlatingartíð, og hon er til konuna. Gjarna fái eg dóttrina at vera stuðulspedagog.

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***
Fyrst og fremst eini góð jól fyri mína familju og alt Føroya fólk. Fái eg so eina góða bók at hugna mær við á jólum, so er mín tørvur nøktaður.


























